**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Frásøgn

## Úrslit av vitjanum á eldrastovnum hjá Tórshavnar kommunu

(Tilhaldum, røktarheimum, sambýlum, URD og heimarøktini)

**Gjørt hevur**: **Eldráðið í Tórshavnar kommunu 2026**
Annemi L. Joensen,
Leivir Hansen,
Bergljót av Skarði,
Jóhan Carl Dam
Marin Rasmussen

**Tíðarskeið: februar – mai 2026.**

Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Indhold

**Inngangur** ... 1

*Eldrapolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu* ... 1

*Endamál* ... 2

**Háttalag** ... 3

**Úrslit** ... 4

*Faklig dygd* ... 4

Fakfólkamangul ... 5

Raðfesting av fakligari vitan ... 5

Føðsla ... 5

Rørsla og virkni ... 6

Brúkaratrygd ... 8

Kommunulæknaviðurskifti ... 9

Brúkaraupplivað dygd ... 10

*Fjølbroyttar búståðarmøguleikar* ... 10

*Vælvera* ... 11

**Tilmælir** ... 13

Størri mál ... 13

Skjótt skiftir seiðir ... 14

Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

# Inngangur

Smb. Viðtøkunum fyri eldraráðið og við støði í Løgtingslóg nr. 19 frá 7. 2014 apríl um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er Eldraráðið ráðgevi hjá Býráðnum og fær í lag samskifti millum eldri borgarar og kommununa. Eldraráðið skal sostatt kunna seg um ynskir og tørv teirra gomlu og um kommununar viðurskifti á eldraøkinum. Sostatt virkar Eldraráðið sum bindilið millum eldri borgarar og býráðið í samband við tilrættaleggingina av eldrapolitikkinum. Eldraráðið, sum bleiv valt í dec. 2025. setti sær tí fyri at vitja øll støð í kommununi, har eldri savnaðust og/ella búðu. Á tann hátt metti ráðið, at tað kundi hoyra, hvat rørdist millum tey eldru, tá talan var um tey tilboð kommunan hevði til tey – hvat var gott og hvat kundi verið betur. Við at bera hesa vitan aftur til kommununa, kundi ráðið vera millumlið millum tey eldru og kommununa.

## *Eldrapolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu*

Í sambandi við at eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita 1. januar 2015, varð eldrapolitikkur orðaður og samtyktur á býráðsfundi 11. desember 2014. Fyri at røkka málunum í verandi eldrapolitikki, hevur verið arbeitt miðvíst við at framtíðartryggja eldraøkið, og at menna dygdina í tænastum og tilboðum í Heilsu- og umsorganartænastuni.

Dygd verður býtt sundur í tríggjar partar.

Organisatorisk dygd,

Faklig dygd

Brúkaraupplivað dygd.

Síðani eru tilboð ment til eldri fólk í Tórshavnar kommunu, bæði tá ræður um heilsurøkt og umsorgan, bústovnar til røktarkrevjandi, heilsustimbran og fyribyrgjandi rørsluátøk, mentan og ítriv og aktivitetir á røktarheimum.

Heilsu- og eldranevndin avgjørdi á fundi í mai 2024 at fara undir tilgongdina at endurskoða eldrapolitikkin. Í hesum sambandi varð byrjað við at skipa eina verkstovu í Tilhaldinum 21. mai 2024, har eldri fólk í Tórshavnar kommunu høvdu møguleika at koma við viðmerkingum og hugsanum um, hvat ein eldrapolitikkur eigur at innihalda. Síðani er eldrapolitikkurin endurskoðaður, og niðanfyri standandi er úrslitið av tí arbeiðinum.

Politikkurin fyri tíðarskeiðið 2025 - 2030 leggur dent á

- virkni,
- sjálvbjargni,
- virðing,
- sjálvsavgerðarrætt,
- tryggleika og nærleika,
- virkisføri og
- inklusjón,
- yrkisføri og
- góða leiðslu

## *Endamál*

Endamálið við vitjanunum hjá eldraráðnum var at fáa innlit í:

- Ynskir og tørv hjá teimum eldru.
- Viðurskifti, sum høvdu ávirkan á arbeiðið at ganga hesum ynskjum og tørvum á møti.

Fyriuttan hesi viðurskifti, so eru onnur øki í kommununi, sum eru viðkomandi fyri Eldraráðið at seta seg inn í. Her verður hugsað um t.d. bussleiðina, mentanar- og frítíðartilboð og kommunulæknaviðurskifti.

Vitanin, sum eldraráðið hevur fingið til vega, kann vónandi viðvirka til, at Tórshavnar kommuna fær:

- eina enn breiðari vitan um, hvat kann betrast og tillagast innan eldraøkið
- kunnleika um hvørji tiltøk, partvíst kunnu bøta um demografisku avbjóðingarnar innan eldraøkið

Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Háttalag

Fyri at fáa fatur á vitanini, setti Eldraráðið sær fyri at vitja allar stovnar, sum hoyra undir eldraøkið í Tórshavnar kommunu. Vitjanirnar fóru fram í tíðarkeiðnum febr. – mai. 2026. Samskift var við; við brúkarar og búfólk, avvarðandi og starvsfólk.

Viðgerðin av innkomnu vitanini tekur støði í omanfyri lýsta eldrapolitikki hjá Tórshavnar kommunu. Yvirskipað verða tey ymisku viðurskiftini eyðmerkt við atliti til:

- Fakliga dygd
- Brúkaraupplivað dygd

Innan fakliga dygd setir eldraráðið m.a. tað, sum starvsfólk hava søknast eftir, meðan brúkarauppliva dygd umfatar tað brúkarir/búfólk og avvarðandi hava ført fram.

Síðan nágreina vit hesi hugtøk við støði í:

- virkni,
- sjálvbjargni,
- virðing,
- sjálvsavgerðarrætt,
- tryggleika og nærleika,
- virkisføri og
- inklusjón,
- yrkisføri

Haraftrat verða viðurskiftini bólkað í smámál/stutttíðarmál og stórmál/langtíðarmál. Á henda hátt vóna vit at fáa politiska myndugleikan í kommununi at síggja avbjóðingarnar sum viðkomandi at viðgera og raðfesta.

Viðmælini verða lýst og grundgivin, so hvørt tey ymisku umráðini eru viðgjørd.

Fyri at ongin av informantunum skal føla seg lopnan um ella gloymd, hevur Eldraráðið valt at hava øll viðurskiftini, sum blivu nevnd, við í hesi frásøgn, óansæð um tað eru fá ella fleiri, sum hava vístu á tey. Haraftrat hevur ráðið mett, at tess fleiri viðurskifti verða tikin við, tess fjølbroyttari vitan fær kommunan.
Summi viðurskifti eru minni mál, sum lættliga og uttan stóran kostnað, kundu betrast, meðan onnur viðurskifti verða metta at vera størri og meira umfatandi mál.

Brotið **Úrslit** endar verður við at taka samanum vitjanirnar og nevna nøkur viðurskifti, sum ikki beinleiðis hoyra til omanfyri nevndu hugtøk.

At enda kemur eldraráðið við tilmælum til nøkur útvald viðurskifti.

# Úrslit

Ymiskt var hvussu nógv fólk eldraráðið møtti á teimum ymisku vitjanum. Í tilhaldunum, á Lágargarði og á URD var góð uppmøting, meðan tað á hinum stovnunum var meira misjavnt. Tó fekk ráðið allastaðni høvi at tosa við búfólk ( undantikið tey, sum vóru nógv merkt av síni demenssjúku) og starvsfólk. Nøkur avvarðandi hava tó vent sær til eldraráðið aftaná vitjanirnar, við sínum ynskjum og hjartasuffum.
Gjøgnumgangandi vóru búfólk nøgd við sína støðu. Tey vóru glað fyri at vera saman við sínum "javnlíkum", tí tað gav møguleikar fyri gevandi samveru. Eisini vóru tey glað fyri, at stovnarnir skipaðu fyri ymiskum tiltøkum, at høvi var at fara túrar "út úr húsinum" og at høvi var at luttaka í kropsligum og handaligum virkni. Tey, sum komu í tilhaldini, vóru eisini glað fyri hesa skipan.
Brúkararnir á URD vóru eisini sera glaðir fyri tey tilboð, hesin stovnur hevði at bjóða.
Nøgdsemi hjá starvsfólkunum var ymiskt. Nøkur viðurskifti vóru tey nøgd við, meðan onnur kundu tey hugsa sær øðrvísi. Gjøgnumgangandi vóru avvarðandi tey, sum vístu minst nøgdsemi.
Men hóast nøgdsemi var lutfalsliga gott, vóru ymisk viðurskifti, sum kundu betrast.

## *Faklig dygd*

Faklig dygd verður býtt upp í ávís evnir. Byrjað verður við teimum málum, sum vit meta eru størri mál.
Her eru ymisk viðurskifti, sum gera seg galdandi, bæði sæð útfrá brúkara-, avvarðandi og starvsfólka sjónarmiði.

## Fakfólkamangul

Starvsfólk siga at tað er stórur mangul er á fakfólki, serlig á røktarheimunum og innan heimarøktina. Avleiðingin er at ábyrgdin hjá teimum, sum hava røktarfakliga útbúgving gerst so stór, at hesi hava lyndi at brenna út. Tí velja tey at fara í onnur størv. Av tí at Heilsuskúlin í Hovi hevur boðað frá umskipan av útbúgvingini til heilsuhjálpara og heilsurøktara, sum inniber møguleikan at taka meginpartin av útbúgvingini, uttan at vera staðsett í Hovi, hevur Eldraráðið valt ikki at gera meira við hetta málið nú, men heldur bíða eftir úrslitinum av hesi umskipan.

Heimarøktin er eisini nógv merkt av manglandi starvsfólki til økta tørvin á heimarøkt. Trupult er at fáa fleiri fólk, tí ongin søkir lýst størv. Í verandi løtu er bíðitíðin eftir heimarøkt 4 – 6 vikur. Ynskiligt hevði verið, at hon varð stytt munandi. Tí ynskja tey:

- **broytta mannagongd at søkja eftir fólki**

Her hugsa tey bæði um á hvørjum miðlum søkt verður, og hvussu lýsingarnar eru orðaðar.

## Raðfesting av fakligari vitan

Ein afturvendandi avbjóðing á røktarheimunum var, at nógv tíð hjá leiðarunum, sum eru útbúgvin røktarstarvsfólk (sjúkrarøktarfrøðingar), verður brúkt til fyrisitingarligar (starvsfólkamál og skrivstovuarbeiði) uppgávur. Ístaðin fyri at brúka fakligu orkuna uppá røktaruppgávur, sum kundu komið búfólkunum til góðar, og sum eru teirra sermerkta fakøkið, verður orkan brúkt til uppgávur, sum ikki hoyra til teirra fakøkið. Av tí at fakútbúgvin røktarstarvsfólk er ein stórur mangul innan økið, varð hildið, at teirra fakliga vitan kundi verið betur brúkt til gagns fyri búfólkini. Tí var tað eitt stórt ynski at:

- **Seta skrivstovufólk at taka sær av skriviborðsarbeiði, so heilsufakfólk kunnu verða loyst frá hesum uppgávum.**

## Føðsla

Kostur hevur týdning fyri bæði heilsu og vælveru. Serliga tá hugsað verður um heilsu, hevur innihaldið av føðsluevnum og orku stóran týdning. Umframt at gera mat til búfólkini, letur køkurin á Lágargarðið eisini fleiri verðar av mati út av húsinum, tað veri seg til heimabúgvandi og aðrar

stovnar innan eldraøkið. Nógv arbeiði stendst av at rokna føðsluevnini og orkuna út, so at hvør verur inniheldur røttu nøgd av hesum. Tí er eitt ynski frá køkinum á Lágargarði at fáa hjálp til eitt:

- **Forrit, sum kann fáa hesar útrokningarnar at virka**

Fyriuttan at tryggja dygdina í matinum, so vildi eitt slíkt forrit eisini kunna leysgivið fakligu arbeiðsorkuna, sum í dag verður brúkt til hesar útrokningar, soleiðis at hon kundi verið brúkt betur og meira hóskandi í køkinum, ið sum er manglar fakfólk innan føðsluøkið.

Annað, sum eisini hevur týdning fyri føðslustøðuna hjá fólki, er teirra tannstøða. Um trupulleikar eru við pínu orsaka paradentosu, svampi o.l. og manglandi tonnum, er trupult at eta nokk av tí kosti, sum annars er útroknaður at vera nøktandi. Kanningar í t.d. Danmark vísa eisini, at føðslustøðan versnar hjá eldri, sum koma á røktarheim. Manglandi føðsla økir um vandan fyri ymiskum brunum, tí vøddastyrkin lækkar. Tí økist vandin fyri t.d. bløðrubruna og lungnabruna. Fyriuttan menniskjaligu avleiðingarnar, sum í ringasta føri kunnu kosta lív, so krevur tað eisini meira fakliga orku at passa hesar brúkarar. Tí var tað eitt gjøgnumgangandi ynski at fáa fasta skipan við:

- **Tannrøkt á ellis- og røktarheimum**

Kanningar vísa eisini, at luktur av mati, økir um matarlystin. Tí hevur tað gott árin á hendan, um matur verður gjørdur á staðnum, har fólk búgva. Tí ynskir Heimið við Vallalíð:

- **Køksfólk til heimið**

Á hesum heiminum er talið á búfólki so mikið stórt, at tað átti at verið lønsamt at gjørt mat á staðnum.

## Rørsla og virkni

Rørsla er góð! er eitt av slagorðunum hjá Fólkaheilsuráðnum. Hettar er galdandi óansæð aldur. Rørsla økir um vøddastyrkina og javnvágina. Tá hesi eru góð, minkar vandin fyri at detta og bróta seg sundur. Eldri hava verri við at koma seg eftir slíkt óhapp. Tí økist vandin fyri, at teimum fer at tørva hjálp frá kommununi. At vera virkin so longi sum gjørligt, lækkar eisini tørvin á hjálp. Tørvurin er stórur á plássum, har eldri kunnu venja. URD hevur eitt tilboð, har eldri heimabúgvandi kunnu koma inn at venja eitt ávíst tillutað tíðarskeið.

Bæði starvsfólk, brúkarir og avvarðandi siga at tað vísir seg, at tey, sum hava gjørt brúk av hesum tilboði, skjótt missa nývunnu førleikarnar, tá tey koma heimaftur. Heimið við Vallalíð hevur ein

kjallara, sum kann innrættast til eitt virkishøli. Her kundu brúkarirnir havt høvi at viðlíkahaldsvand eftir t.d. uppihald á URD.

Eitt virkistoymi, har tvey fólk eru í starvi, er knýtt at stovnunum innan eldraøkið. Yvirhøvur var nøgdsemið stórt við arbeiðið, toymið ger. Men tað kemur ov ofta fyri, at tað má avlýsa vitjanir, tí tað nær ikki runt til allar stovnar. Hetta ger seg serliga galdandi fyri Sambýlini.

Tí er eitt ynski at økja um venjingar- og virkismøguleikarnar við at fáa eitt:

- **Nýtt virkis- og venjingartilboð – sum dagtilhaldið á Lágargarði. Kanska tað kann vera opið um kvøldið og um vikuskiftið?**
- **Virkisrúm á Heiminum við Vallalíð**
- **Uppraðfesta virkistoymið**
- **Umlættingarmøguleikarnir verða meira fjølbroyttir**

Tá tað snýr seg um heimarøktina, so kundi avleiðingin av at økja virkisøkið til eisini at umfata kvøld og vikuskifti, og at broyta umlættingartilboðið til eisini at umfata eitt styttri tíðarskeið t.d. eitt vikuskifti, lætta um hjá starvsfólkunum fyriuttan hjá avvarðandi, so tey orka longri at vera um síni.

Heimabúgvandi sjálvbjargin eldri hava eisini brúk fyri at røra seg. Kommunan hevur økt um møguleikan at ganga túrar, við at hava gjørt fleiri gøtur runt um í kommununi. Tað eru fólk yvirhøvur sera glað fyri. Eisini eru benkur settir upp, sum tey eisini eru glað fyri. Men tey ynskja sær eisini møguleikan at hvíla beinini, tá tey ganga fram við almennum vegum:

- **Seta benkur upp fram við almennum vegum**

Sum er, er ein gøta frá Tjarnagarði til Hoyvíkstjørn. Hendan er tó so smøl, at koyristólar ikki kunnu koyra á henni. Tí ynskja tey at:

- **Breiðka gøtu av Tjarnargarði til Hoyvíkstjørn**

Tveir røktarvørðar eru knýttir at stovnunum innan eldraøkið. Hesir gera eitt stórt og dygdargott arbeiði, sum stovnarnir og serliga búfólkini eru sera glað fyri. Tó hava teir ov nógv um at vera. Ofta verða teir noyddir at frásiga sær umbidnar uppgávur. Hetta ger seg serliga galdandi fyri Sambýlið í Kollafirði. Her fer nógv tíð til koyring. Tí er eitt ynski um at:

- **Uppraðfesta røktarvørðarnar.**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Búfólkini á teimum ymsu stovnunum vilja fegin sleppa túrar. Um røktarvørðurin ikki er tøkur at koyra, brúka starvsfólk sín egna privata bil. Hetta kann vera tvørligt, tí hesin er ikki gjørdur til endamálið. Tí hevði verið ynskiligt at havt ein:

- **Túrbuss sum kann lænast til at koyra túrar við**

Hesin skal kunn koyrast uttan koyrikort til buss.

## Brúkaratrygd

Starvsfólk siga at tað kemur av og á fyri, at komið verður inn í heim, har reinførið er út av lagi vánaligt. Tað snýr seg bæði um reinføri av sjálvum heiminum, persónligt reinføri og matarreinføri. Støðan kann vera so ring, at hetta er at samanbera við vanrøkt. Tað hendir seg eisini, at heimarøktin gerst varug við blá merkir og aðrar skaðar, sum eru illgrunasom. Í slíkum førum siga starvsfólk seg mangla møguleikar at handla. Væl vitandi at hettar er ein etiskur spurningur, tí hava fólk sjálvi avgjørt at liva á ein slíkan hátt, er tað ikki loyvt at frátaka teimum sjálvsavgerðarrættin. Hinvegin kann orsøkin eisini vera onnur viðurskifti, sum gera seg galdandi. Tí søknast starvsfólk eftir eini:

- **Eldravernd**

Eldraverndin kundi t.d. verið ráðgevandi og vegleiðandi í mun til, hvat er rættast at gera.

Sambýlini eru gjøgnumgangandi ikki nýtilig til tað virksemi, sum fer fram har. Av tí at ætlanin er at tøma Sambýlini, tá Røktarheimið á Stórubrekku er liðugt, fara vit ikki í smálutir við hesum. Tó eru nøkur viðurskifti, sum mugu betrast, meðan bíðað verður. Hettar eru viðurskifti, sum hava við brúkaratrygd at gera. Sama ger seg galdandi fyri Røktarheimið við Vallalíð. Her og við Sambýlið Oman Mattalág er tað ikki trygt hjá búfólkunum at fara út. Tað mangla girðingar, sum forða fyri, at tey detta oman brekkuna (Vallalíð) og í ánna (Mattalág). Tað er ein menniskjarættur at sleppa út og fáa fríska luft uttan vandi fyri skaða. Tí er tað av stórum týdningi at búfólkið verður tryggja við at:

- **Seta girðingar upp so búfólkini frítt kunnu fara útum.**

Tilhaldið í Nólsoy heldur til í einum sethúsum. Ongin ætlan er um at fáa onnur høli til virksemið, hóast núverandi hølini eisini hava ymiskar manglar. Ein mangul er neyðútgongd. Tað er av alstórum týdningi, at fólk hava fleiri rýmingarleiðir, um so er at eldur kemur í. Tí er eitt ynski:

- **Neyðútgongd í Tilhaldinum í Nólsoy**

Á Ellisheiminum er tað ikki trygt at brúka útistovuna. Hendan er í so vánaligum standi, at hon kann detta niður, nær tað skal vera. Væl vitandi at bert átrokandi ábøtur skulu gerast á Ellisheimið, verður mett, at tað

er alneyðugt fyri trygdina hjá búfólkunum, at ábøtur verða gjørdar á útistovuna, tí hon verður javnan brúkt til samveru. Tí er eitt ynski at:

- **Útistovan á Ellisheiminum verður umvæld, so hon trygt kann brúkast.**

Fyri at kunna gera brúk av einum tilboðið krevst, at tilboðið er atkomuligt fyri tann, sum skal gera brúk av tí. Tá hugsað verður um URD, so kann tað tilboðið, sum hesin stovnur er ætlaður til at bjóða, gera atkomuligheitina trupla hjá borgarum, sum hava brúk fyri hesum tilboði (brúka høkjur ella rollator). Hesi megna ikki at koma inn gjøgnum úthurðina uttan hjálp, tí hurðin er tung og tvørlig at fáast við. Tey eru m.a. í stórum vanda fyri at koma í klemmu millum hurðina og karmin, og harvið fáa skaða. Fyriuttan at hurðin nærmast er likamliga skaðilig fyri hesi fólk, so økir hon eisini um kensluna av, ikki at vera sjálvbjargin og virkisfør, tí hjálp krevst fyri at sleppa inn.

Tá so samstundis verður  havt í huga, at stovnurin t.d. serliga er ætlaður til hesi fólki, tí tað aloftast eru tey, sum hava brúk fyri endurvenjing, er tað alneyðugt við:

- **Nýggjari brúkaravinarligari úthurð á URD**

## Kommunulæknaviðurskifti

Starvsfólk siga at eitt afturvendandi mál vóru kommunulæknaviðurskiftini á røktarheimunum. Sum er, so hava búfólkini sín egna lækna. Tað inniber at fleiri kommunulæknar kunnu vera knýttir at heiminum. Starvsfólkið upplivdi at brúka alt og nógva tíð uppá at fáa fatur á kommunulæknum, serliga um tey skuldu hava fatur á fleiri læknum sama dag. Nógv tíð fór við at bíða í telefonini.

Búfólkini eru tó ikki so sannførd um, at tey skulu fáa annan lækna, tá tey koma á røktarheim. Tey hava kanska havt sama lækna meginpartin av sínum vaksna lívi. Tí eru tey trygg við hann. Tó kunnu aðrar loysnir uppá kommunlæknaviðurskiftini møguliga finnast, soleiðis at bæði starvsfólk og búfólk eru nøgd. Dømi kunnu vera:

- Røktarheimini hava annað tlf.nr. at ringja til.
- Fleiri fyrispurningar kunnu avgreiðast við telduposti
- Fastar læknavitjanir á røktarheimunum.

Tí er eitt ynski at Kommunan fer í:

- **Samskifti við Heilsutrygd og/ella Kommunulæknafelagið, fyri at betra verandi mannagongd**

## Brúkarauppplivað dygd

Byrjað verður við teimum málum, sum vit meta eru størri mál.

### *Fjølbroyttar  bústaðarmøguleikar*

Á vitjanunum hjá Eldraráðnum í tilhaldunum og útfrá samrøðum við fólk, sum venda sær til Eldraráðið, hava vit fingið ta fatan, at eldri fegin vilja hava møguleikan at selja síni hús, og ístaðin fingið eina bíliga eldravinarliga íbúð. Í heimarøktini møta tey eisini ofta hesum ynski. Um møguligt var at fingið eina bíliga eldravinarliga íbúð, so hevði borgarin kunnað verið meira sjálvbjargin og virkisførur longri, og harvið kunna verið heima sum longst. Um íbúðirnar vóru staðsettar fleiri á sama stað t.d. í einum íbúðarblokki, har hølir vóru til felags tiltøk og kømur, sum kunnu leigast eftir tørvi, so vildi hesin møguleiki eisini økt um tryggleikan og nærleikan.

At gera íbúðarblokkar vil eisini viðføra, at heimarøktin verður brúkt meira rationelt, tí flutningstíðin verður stytt.  Haraftrat verða tvey ella fleiri røktarstarvsfólk til staðar, og harvið betur kunnu hjálpast at. Tí er eitt ynski:

- **Eldravinarligar íbúðir**

Tey sum búgva innanfyri bøgarðarnar í Tórshavn, føla seg forfjónaði, tá tey verða flutt útum bøgarðarnar. Tí ynskja tey:

- **Eldravinarligar íbúðir innanfyri bøgarðarnar**

Eitt av endamálunum í eldrapolitikkinum hjá kommununi er eisini, at eldri skulu kunna vera heima sum longst. Hetta ynskja eldri eisini. Avbjóðingin er at tað kann vera ymiskt, hvat hvør hvussu hendan útsøgnin skal tulkast. Heimarøktin søknast tí eftir at:

- **Hugtakið "heima sum longst" verður skilgreinað**

Hvussu nógva heimahjálp skal ein borgari hava tørv á, áðrenn hann verður mettur at hava tørv á røktarheimsplássi?

## *Vælvera*

Á vitjanunum varð komið inn á ymisk mál, sum hvør sær ella samlað hava týdning fyri sjálvbjargni, virkisføri, sjálvsavgerðarrætt, inklusión og tryggleika hjá eldri. Harvið hava tey eisini týdning fyri vælveruna hjá eldri. Eldri, serliga kvinnur , kunnu hava trupult við at halda sær siga, at tá tær skulu á vesi. Sum er, er bert eitt alment vesi í býnum. Sostatt er vandi fyri at "gera í buksurnar", sum m.a. kann upplivast sum mannminkandi og manglandi virkisføri. Tí hevur tað týdning at gera:

- **Fleiri almenn vesi í býnum**

Borgarir siga at fleiri staðir í miðbýnum eru flísar á vegbreytunum brotnaðar og/ella liggja skeivt. Hettar økir um vandan generelt fyri at detta og bróta seg sundur. Men serliga eldri, sum ofta ikki hava góða javnvág og/ella brúka høkjur, eru í stórum vanda fyri at detta. Hettar ger tey ótrygg og bangin fyri at ganga á hesum gongubreytum. Fyriuttan persónligu avleiðingarnar, er mest sannlíkt, at tørvurin á hjálp í dagligdegnum frá t.d. heimahjálpini, økist. Avleiðingin er, at eldri ikki hætta sær í býin at luttaka í almennum tiltøkum. Tí verður heitt á kommununa at eftirhyggja og bøta um:

- **Brotnar og/ella skeivar flísar á gongubreytini í miðbýnum**




Fyri at økja um kensluna av sjálvsavgerðarrætti, sjálvbjargni og virkisføri hjá búfólkunum á stovnunum, nevndu bæði búfólk, starvsfólk og avvarðandi ynski um rullandi kiosk. Harvið fáa búfólkini høvi at keypa sær okkurt, sum tey ynskja sær og sum tey annars ikki fáa. Tí er eitt hugskot at:

- **Taka upp samstarv við heilsølu/handil um at gera rullandi kiosk**

Fyri at vita, um undirtøkan er nóg stór, kann byrjast við teimum stóru røktarheimunum. Og at kioskin t.d. kom einaferð um vikuna.

Lágargarður er elsta røktarheimið og hevur umleið 40 ár á baki. Tað sæst eisini aftur í tí støðu, heimið er í, við tað at har manglar viðlíkahald. T.d. er málingin slitin í fleiri kømrum, fleiri møblar eru gamlir og slitnir. Og ongir hvílirullustólar eru til búfólkini. Tí er eitt ynski frá starvsfólkunum, búfólkum og avvarðandi at fáa:

- **Nýggjar møblar og hvílirullustólar**

**Dømi:**



- **Gjøgnumganga heimið við atliti til viðlíkahald**

Sambýlið Oman Hoydalar hevur eina deiliga terassu, sum búfólkini eru glað fyri og kundu hugsa at brúkt nógv. Men trupult er at fáa fulla gleði av hesi, tí bilferðslan eftir Vegnum Langa órógvar sera illa. Tí ynskja tey sær eina:

- **Ljóðdoyvandi verju móti Vegnum Langa**

## *Ymiskt*

Mál, sum ikki beinleiðis eru knýtt at omanfyri nevndu umráðum.

Sum er mangla parkeringspláss við Sambýli í Kollafirði Kollafjørður er long bygd. So fleiri hava langt at fara, tá tey skulu í tilhaldið. Tí koma tey í bili. Men parkeringsplássini eru fá. Tí er trupult at sleppa av við bilin. Tí er eitt ynski:

- **Fleiri parkeringspláss við Tilhaldið í Kollafirði**

Á Vallalíð er eitt umklæðingarrúm til starvsfólkini. Men har arbeiða bæði kvinnur og menn. Tí er tørvur á umklæðingarhølum til bæði kynini. Tí er eitt ynski eitt:

- **Eitt umklæðingarrúm aftrat í Vallalíð**

Av og á koma klagur um bussleiðina til Eldraráðið. Hesar snúgva seg um leiðirnar hjá bussunum. T.d. eru tað ávís økir í kommununi, sum ikki eru umfataði av bussleiðunum. Haraftrat snúgva klagurnar seg eisini um, at ávísir bussførarar koyra avstað, áðrenn fólk hava sett seg, umframt at teir koyra ófantaliga. Tí kundi verið ynskiligt at:

- **Eftirmeta og tillaga verandi bussleiðir**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Tilmælir

Tá hædd verður tikið fyri teimum demografisku broytingum, sum innibera at tað gerast alt fleiri og fleiri, sum gerast eldri, samstundis sum tað gerast alt færri av yngru ættarliðunum, er neyðugt at uppraðfesta fyribyrgjandi tiltøk, soleiðis at eldri longst møguligt kunnu vera sjálvbjargin. Um hugt verður eftir eldrapolitiska endamálinum, so ynskir kommunan eisini at raðfesta hetta. Ein háttur at nágreina hvørji hvørji tiltøk kunnu viðvirka til sjávbjargni, er við at spyrja brúkarar og starvsfólk innan eldraøkið. Hesi hava stóra vitan um, hvat skal til fyri at vera sjálvbjargin og virkin, tí tey hava møguligar avbjóðingar tætt at kroppinum. Starvsfólkini við viðkomandi fakligari útbúgving, hava eisini fakligt grundarlag undir síni vitan. Tí taka tilmælini í hesi frásøgn støði í tí vitan eldraráðið hevur fingið á sínum vitjanum.

Tilmælini kunnu býtast upp í størri mál, sum krevja longrivarandi og djúpari politiska og fyrisitingarliga viðgerð, meðan onnur eru skjótari at avgreiða.

29 ynskir komu frá starvsfólkum, brúkarum/búfólkum og/ella avvarðandi. Øll hava týdning fyri trygd og vælveru hjá eldri. Men tað er ov rúgvusmikið at raðfesta og harvið gera tilmælir til øll hesi. Tí verður valt bert at raðfesta tey, sum flest ynsktu, og sum hava størstan týdning.

Tað er tó onki til hindurs fyri at kommunan, av sínum eintingum, raðfestir onnur viðurskifti, enn tey, sum verða raðfest av eldraráðnum. Haraftrat fer Eldraráðið eisini, so hvørt sum útvald umráðir verða loyst, at venda aftur til onnur, sum eru nevnd í frásøgnini.

## Størri mál

Eitt av fyribyrgjandi tiltøkunum er at byggja bíligar eldravinarligar íbúðir, *sí brotið Fjølbroyttar íbúðarmøguleikar.*

Ætlanin er at flyta búfólkini, sum búgva á Ellisheiminum, inn á Røktarheimið við Stórubrekka. Ein av orsøkunum til tað er, at heimið er í vánaligum standi. Kommunan sigur, at endalig støða ikki er tikin til, hvat gerast skal við Ellisheimið til ta tíð.

*Mælt verður til at:*

**Ellisheimið, sum fyrsta útkast, verður umvælt og umbygt til bíligar, eldravinarligar íbúðir.**

Ein týðandi táttur fyri at kunna vera heima og virkin sum longst, er møguleikarnir fyri at røra seg og kunna vera virkin, *sí brotið Rørsla og virkni.*

*Mælt verður tí til:*

- **Virkis- og venjingartilboð, sum er opið um kvøldið og um vikuskiftið**
- **Umlættingarmøguleikarnir verða gjørdir meira fjølbroyttir, soleiðis at umlætting eisini kann fevna um t.d. eitt vikuskifti**
- **Uppraðfesta virkistoymið**

Á øllum røktarheimunum segði leiðslan seg brúka lutfalsliga og nógva tíð til fyrisitingarligar uppgávur og starvsfólkamál, *sí brotið Raðfesting av fakligari vitan.*

*Mælt verður til at:*

- **Seta skrivstovufólk at taka sær av skriviborðsarbeiði, so heilsufakfólk kunnu verða loyst frá hesum uppgávum.**

Fyri at nágreina uppgávurnar og arbeiðtíðina, mæla vit til, at kommunan skipar eitt samskifti við leiðslurnar á hesum stovnum.

## Skjótt skiftir seiðir

Trupult er at fáa fólk at søkja størv innan (serliga) heimarøktina, *sí brotið Fakfólkamangul*.

Mælt verður til at HR deildin hjá kommununi fer í eitt samskifti við heimarøktina, fyri at:

- **Broyta mannagongd at søkja eftir fólki**

Køkurin á Lágargarði hevur eina KT forrit har ein partur kann vera eitt forrit, sum kann rokna føðsluevnini og orkuna út, *sí brotið Føðsla.* Hettar verður ikki brúkt, tí fakligu førleikarnir í køkinum ikki eru til staðar.

*Mælt verður til at KT deildin hjá kommununi fer í eitt samskifti við leiðaran á køkinum fyri at lýsa, hvat skal til fyri at:*

- **Fáa forritið virkið**

Nøkur viðurskifti, sum blivu nevnd á vitjanunum snúgva seg um trygd hjá brúkarum/búfólkum.
M.a. vóru hesi nevnd:

- **Nýggjari brúkaravinarligari úthurð á URD**
- **Girðingar so búfólkini á Sambýlinum við Mattalág, frítt kunnu fara útum, uttan vanda fyri at detta í ánna.**
- **Neyðútgongd í Tilhaldinum í Nólsoy**

Av tí at hesi viðurskifti økja um vandan fyri álvarligum avleiðingum, um ringasta støðan skuldi komið í, verður staðiliga heitt á kommununa um at loysa hesi viðurskifti skjótast gjørligt.